Er tað satt A-dur

```
A                                    E
Er tað satt, at Jesus er mín bróðir,
E         E7                           A
hoyrir himmalarvurin mær til?
A          D                      A
Burtur tá, tit tungu táraflóðir,
          E7                               A
burtur alt, sum hjartað tyngja vil!
```

2. Hann mín bróðir - undur yvir undur,
størsta náði, nøkur sál kann fá!
Tó mín trúgv er lítil mangar stundir,
orði hans eg tryggur byggi á.

3. Faðir mín og tykkara, hann segði -
á tann troyst, at Jesus segði so!
Frið mær keypti krossins streymur reyði -
á, hvør stórt, at eg fekk hesi boð!

4. Meiri vert er hetta bróðurbandið
enn, um allan heimin eg so vann;
eg í sambandi við honum standi,
havi rætt til sama arv sum hann.

5. Sama arv í Harrans ljósa heimi,
sama Gud og Faðir - á, hvør stórt!
Hjálp mær, Jesus, at eg aldri gloymi,
hvussu ríkan tú meg hevur gjørt!

**Lina Sandell (Sv.), 1832-1903.*
*(V. Danielsen týddi).*